FØÐINGAR

11. august fingu Kitty Ferjá Joensen og André Isholm Andrésen, Árhus, eina dóttur. Hon var 49,5 cm. long og vigaði 2910 gr.

20. august fingu Erla Dahl og Hjalmar Óli Olsen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 4200 gr.

20. august fingu Marian og John Fugløj, Klaksvík, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4025 gr.

21. august fingu Halldis Joensen og Jónleif Müller, Keypmannahavn, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 3500 gr.

23. august fingu Aslaug og Markus í Norðnástovu, Mikladalur, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4150 gr.

24. august fingu Anni Arge Lamhauge og Sigurd Leifsson Lamhauge, Kaldbak, eina dóttur. Hon var 53 cm. long ov vigaði 4300 gr.

25. august fingu Ida Davidsen og Marnar Tausen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3300 gr.

25. august fingu Bjørg og Terji Nielsen, Tórshavn, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 3150 gr.

26. august fingu Una og Niels Peter Bech, Sølvdarfjørður, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 4325 gr.

26. august fingu Irdi og Kári Müller Jacobsen, Klaksvík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3860 gr.

26. august fingu Birna Mohr Joensen og Niclas Joensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3575 gr.

28. august fingu Annika R. Holm og Jacob Eli Olsen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4050 gr.

28. august fingu Anja Zachariasen, Streymnes og Dan Jacobsen, Kollafjørður, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3950 gr.

28. august fingu Mariann og Jákup Eli Jacobsen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3400 gr.

ANDLÁT

23. august
Ásleyg Winther Jacobsen, Klaksvík, 90 ár

25. august
Olaf Sundar Hansen, el-installatørur í Havn, 66 ár
Tórður Zachariassen, Tórshavn, vanliga nevndur Tórður í Hesti, 88 ár

26. august
Frits Nicodemussen, Sandur, 84 ár
Sivert Andreas Rasmussen, Klaksvík, vanliga nevndur Dia í Fugloy, 80 ár

28. august
Mary Odny Thomsen, Norðragøta, 57 ár

30. august
Elisabeth Joensen, ættað úr Lamba, bús. í Miðvági, 85 ár

Eitt ljós á gøtu míni

»Gud er okkum vernd og verja, ein hjálp í trongdum, ið aldri svíkur. Tí óttast vit ei, um so jørðin verður umskift, um so fjøllini ryðja í havdýpið oman, um so havaldan sjóðar og brýtur, og bergið í ódnini skelvur. Harrin er við okkum, herskaranna Guð, Jákups Guð er vár fasta borg«.

Sálmur.46, v. 2-4

Sálmurin hevur djúpar røtur, ið kanska ganga heilt aftur í stóra vatnflóð og flóðaldu, ið verið hevur í miðeystri í ókendum fyrndartíðum, og hóast Guð við skapan síni sigraði á hesum vondu maktum, so má hesin bardagi halda fram, tí flóðaldan verður í sálminum sæð sum ein vanlukka, ið aftur kann ráma mannaættina bæði í dag sum í komandi øldum og tíðum.

Men tá alt hetta er skrivað okkum í nútíð, verður tann boðskapur boðaður, at Guð framvegis er skaparin – at ikki bara einaferð var tað, at Guð í stríði við óndar maktir skapaði himmal og jørð, men hetta er nakað, Guð eisini ger tann dag í dag og fer at gera allar dagar alt til veraldar enda. Sostatt eru allar tíðir umboðaðar í hesum sálmi: tað, sum var – er – og verður.

Nú lysti kanska onkran at spurt: Hvat er so tað týdningarmesta í guðstrúnni? Eru tað allar tær fyrndargomlu røturnar aftur í søguna ella kanska heldur framtíðin – hetta, at Guð elda eingin ár, og at gleðiboðini eru galdandi okkum ætt eftir ætt og mann eftir mann?

Eisini hetta svarar sálmurin okkum uppá. Sum hann er bygdur upp, síggja vit, at hann er vorðin bráktur í guðstænastuni í halgidóminum og harvið ber hesin sálmur okkum boðskapin um, at Guð er har ikki bara, fyri at vit skulu tala um hann í fortíð, nútíð ella framtíð, men hann er har fyri at vit nú ikki bara skulu tala um hann, men við hann, heita á hann og biðja til hasara. Tann sami alvaldi Guð, ið skapaði allar lutir – sum framvegis í stríði við óndar maktir heldur okkum á lívi, hann hoyrir eisini htit lítla mannabarnið – okkum, ið bert ana her á foldum skamma stund og so eru horvin aftur í endaleysa rúminum, at valla sæst farvegurin eftir okkum.

Rætt er, at hesin sálmur stendur í tí gamla sáttmálanum, men Martin Luther man hava skilt hann rætt við eisini at seta hann í samband við upprisna Harra okkara, Jesus Krist, og so var hetta ein sálmur, ið var Luther so dýrabarur og talandi, eisini tá flóðaldur og sjógvar fóru at gera um seg í hansar alív. Og tí hevur hann eisini yrkt kanska sín kendasta sálm við sálmi 46 í GT í huga: »Vár Guð er føst og haldgóð borg, har vit væl vardir standa«. Og so er hetta eisini galdandi í tí nýggja sáttmálanum, at har »vár egin kraft so lítil er, at brátt berst tap í hendi, har ein í stríð við okkum fer, sum Guð við veldi sendi«. Tí at boðskapin um Guðs nýskapan, hansara framhaldandi stríð móti óndum maktum, hann kenna vit einabest aftur frá syni hansara Jesusi Kristi – hansara lívi, deyða og uppreisn. Amen.

Martin R. Jacobsen

KIRKJUR & SAMKOMUR

Gudstænastur 11. sunnudag eftir Trinitatis
Havnar kirkja: kl. 11, Sonja Klein. (Talvan gongur fyri KFUM í Havn)
Nólsoy: kl. 12, altarg., Bjarni Bæk
Vesturkirkjan: kl. 11,
Kirkjubøur: kl. 12.15, Heri Joensen
Argir: kl. 11, altarg., Bergur D. Joensen
Kollafjørður: kl. 11,
Kvívík: kl. 12, Marjun Bæk
Vestmanna: kl. 11, altarg., Inga P. Dam. (Innsavnan)
Miðvágur: kl. 11, David Johannesen
Selatrað: kl. 11, Jógvan Fríðriksson
Gøta: kl. 11, deyvagudstænasta, altarg. Jónsvein Bech. (Talvan gongur fyri deyvameinigheitina)
Fuglafjørður: kl. 11,
Funningsfjørður: kl. 16, Uni Næs
Gjógv: kl. 12, messa, Emil Olsen
Christianskirkjan: kl. 11, (sjónv.) altarg., Hans Eiler Hammer
Porkeri: kl. 12, Ólavur Rasmussen. Frá sunnudegnum 3. september verður farið í kirkju kl. 12
Hvalba: kl. 17, altarg., Ólavur Rasmussen
Leitið: kl. 11,
Sumba: kl. 12.15, Petur M. Rasmussen

Ebenezer
Sunnudagin kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 familjumøti, kl. 21 útimøti.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18 evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

Rhema á Hálsi
Fríggjakvøldið kl. 18-19 A.T.A.P. (barnaklubbi).
Leygarkvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11 familjumøti, Vagn í Geil talar.
Morgunbøn mánadag til fríggjadag kl. 8-9. Øll eru vælkomin.

Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 17 landsbøn, í morgin kl. 11 morgunmøti, kl. 18 møti, kl. 22 útimøti (um viðrar).
Mánadagin kl. 20 bønarskúlin.

Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13 sunnudagsskúli, kl. 17 møti.

KFUM og KFUK í Havn
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Vilhelminu Larsen úr Dali.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn byrjar aftur eftir summarfrítíðina.

Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin kl. 14 í Hoyvíkar skúla sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn, kl. 18 møti við Sangbrødrum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Frelsunarherurin Tórshavn
Heimaforbundið byrjar 7. sept.
Fríggjadagin kl. 20.30 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11 møti, major Tjåland talar, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn, kl. 18 møti.

Meinigheitshúsið í Havn
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli og kl. 18 møti við Sólrunn Poulsen. Innsavnan til húsið.
Týskvøldið kl. 20 bíbliutími v/Petur Steingrund.
Mikukvøldið kl. 19 venur Meinigheitskórið.
Hóskvøldið kl. 20 verður ungdómsmøti v/Andrass Arge.

Filadelfia, Sundalagi
Møti verður í morgin kl. 18 í Hósvík v/Sam Jacobsen.

Vestmanna missiónshús
Sunnudagin kl. 14.30 sunnudagsskúli, kl. 18 ytrimissiónskvøld fyri og við Jórun og Nurlan Malaikev. Birgit og Niels Juul Olsen og Ella Niclasen greiða frá og sangbólkurin Gittit syngur. Innsavnan.

Saron, Vestmanna
Sunnudagin kl. 18 møti.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

Kirkjan, Norðskála
Sunnudagsskúlin byrjar aftur nú sunnudagin kl. 14.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum
Sunnudagin kl. 14 verður sunnudagsskúli, møti kl. 19 har Regin Høgnesen talar og Húsakórið syngur. Innsavnan, barnaansing og drekka.

Ørkin, Saltangará
Møti verður sunnudagin kl. 19 í Arbeiðarafelagshúsinum Hæddini í Saltangará v/Osbjørn Joensen, høvið verður til at fáa forbøn.
Týsdagin kl. 20 húsmøti hjá Jonnu og Palla Højgård, Saltangará.
Hósdagin kl. 20 bønarmøti.
Morgunbøn er mánamorgun, mikumorgun og fríggjamorgun frá kl. 6-7. Verið hjartaliga vælkomin.

Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21 opið hús við Maibritt Frederiksberg.
Sunnudagin kl. 17 møti við Vinjard, Leif o.fl. Barnamøti kl. 17. Tú ert vælkomin í Kelduna.
http://www.keldan.fo

Leirvíkar missiónshús
Ungdómsmøtini byrja aftur í kvøld kl. 20. Í kvøld verða tað Reimund og Fleiri, ið leggja fyri. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Sumba
Møti sunnudagin kl. 18 v/Hilmar Bech. Øll eru vælkomin.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Jens og Nimrodd. Innsavnan verður til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Sion, Vágur
Morgunmøti verður sunnudagin kl. 11, sunnudagsskúli kl. 11.30 og møti kl. 16. Telefonandakt 373 777.

Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11 breyðbróting, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. fundur, kl. 21 útifundur (um viðrar).
Mánadagin kl. 20 uppbyggingarfundur, talari: Robert McLuckie.
Ónsdagin kl. 20 bønarfundur.

Frelsunarherurin, Vágur
Leygardagin kl. 20 bøn og lovsangur.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 19 møti við Toril Waag Olsen.
Mánadagin kl. 20 Heimaforbundið.

Læknavaktir

Tórshavn:
Læknavaktin tlf. 310033.

Eysturoy:
Leygardagin 2. september:
Pól Johs. í Horni, tlf. 444038

Sunnudagin 3. september:
Magnus á Stongunum, tlf. 423006

Norðoyggjar:
Leygardagin 2. og sunnudagin 3. september:
Jens Nylander Massen, tlf. 455045

Vágar: tlf. 332413

Suðuroy (norður): Tlf. 371560

Suðuroy (suður): Tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13–14. Tlf. 314544.

Silvurbrúdleyp

Mikudagin 30. aug. høvdu Katrin Næs og Hans Pauli Simonsen, Hvannasund, silvurbrúdleyp.
Dagurin verður hildin í dag fyri innbodnum á Hotel Norð.

Brúdleyp

Í dag, 2. sept. giftast Maria Isaksen og Kjartan Hansen, bæði úr Klaksvík.
Vígslan verður í býráðshúsinum í Klaksvík kl. 15.

Leygardagin 7. okt. kl. 15 giftast Heidi Rasmussen og Regin Guttesen, vígslan verður í Ebenezer. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma í veitsluna, sum verður í skúlaheiminum við Marknagilsvegin kl. 19, verða vinarliga biðin at siga frá á tlf. 224 007 innan hósdagin 28. sept.

100 ár

Mánadagin 4. september verður Andrea Sivertsen, við Gjógv, 100 ár.
Í sambandi við føðingardagin verður opið hús í Gjáargarði frá kl. 16 til 20.

Konfirmatión

Sunnudagin 3. sept. verður Sigurd Jón Lisberg, sonur Maluna og Dánjal Johan Lisberg konfirmeraður.
Adr.: Grønhøj 13, 3630 Jægerspris.

Prógv

Kim Durhuus hevur á Aalborg Universitet lokið prógv í HD, við sergrein í avsetningsøkonomi.

Hans Jon Askham, Hvannasund, hevur lokið yrkisútbúgving sum maskinsmiður. Læruplass: P/F Tórshavnar Skipasmiðja, Tórshavn.

Judith Andrea Ludvig, Fámjin, hevur lokið yrkisútbúgving sum matstovuassistentur. Læruplass: Perlan P/F Trygin, Tórshavn.

Mariann Mo Ejdesgaard, Tórshavn, hevur lokið yrkisútbúgving innan almenna fyrisiting – stat. Læruplass: Stuðulsstovnurin, Tórshavn.

Robert Bernardson, Miðvágur, hevur lokið yrkisútbúgving sum maskinsmiður. Læruplass: P/F J. K. Joensen & Sonur, Miðvágur.

Oddgeir Overskeid Lützen, Tórshavn, hevur lokið yrkisútbúgving sum stálskipasmiður. Læruplass: P/F Tórshavnar Skipasmiðja, Tórshavn.

Jákup Helgi Egholm, Fuglafjørður, hevur lokið yrkisútbúgving sum bilsmiður. Læruplass: Bilverkstaði á Skála, Skáli.

Marni av Kák Joensen, Sørvágur, hevur lokið yrkisútbúgving sum radiomekanikari. Læruplass: Fa. Fokus Elektronik, Tórshavn.

sosialurin
Altið fyrst við
www.sosialurin.fo

Tiltøk

Frá Felagnum Pinkubarnadeyði
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánaði kl. 14.00 í Jákupsstovu, J. Patursonargøta 24, 100 Tórshavn. Nærri fæst at vita hjá Annvør Nielsen tlf. 317261, Helle Johansen tlf. 317940 ella Sólgerð FOldbo tlf. 422184.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19-21.00 á tlf. 212380.

Tilhaldið í Tórsgøtu 21
Opið er mánadag kl. 10-18. Týsdag-fríggjadag 10-17. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
Mánadagur 4.9.
kl. 10-12 Ítriv
kl. 14-18 Hugnaløta við nál og práti
kl. 14-18 Kortspæl, telving og onnur spøl. Tilm. til døgurðan mikud.
Í vetur verður matgerð í Tilhaldinum undir kvøldskúlaskipanini, hvønn mikudag kl. 10.00-13.30. Tilm. tlf. 421580 Anne Grethe Harlou.
Týsdagur 5.9.
kl. 10-12 Vit baka
kl. 15 Frásagnir, søgur, prát og annað
Mikudagur 6.9.
kl. 10 Fyrireiking til døgurðan
kl. 12 Døgurði
kl. 15 Túrur
Hósdagur 7.9.
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 19 kvøldseta við gestum úr Danmark við sangi og undirhaldi
Fríggjadagur 8.9.
kl. 10-17 Opið hús
Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Vágs Matmøðrafelag
Dagtilhaldið í Vági er opið týsdag og tórsdag frá kl. 15-18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Leygardagin: kl. 17-18.
Sunnudagin: kl. 11-12 og evnisfundur kl. 20-21.30.

LISA
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin hvønn hósdag frá kl. 14.00 til 20.00 og annars eftir avtalu á telefon 320197. Teldupostur lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

Amnesty International Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin:
Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200
Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

Bahá'í Miðstøðin í Gundadali
er opin hvørt mikukvøld kl. 20.00.
1., 2. og 4. hvørt mikukvøld: drekkamuður, óformelt orðaskifti og upplýsing um Bahá'í.
3. hvørt mikukvøld: bønarmøti og drekkamuður aftaná.
Bahá'í-samfelagið í Tórshavn

Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

Føroya Astma/Allergifelag
Postadressa MBF-húsið, Íslandsvegur 10c.
Felagið hevur Tlf./fax 311419.

Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15. Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27. E-mail: ffk@post.olivant.fo

Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

MBF
MBF-skrivstovan fer í summarfrí tann 17. juli fram til mánadagin 21. august.

Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.30 til kl. 15.30. Tlf. 31.7597, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf_fo@post.olivant.fo

Nærvarpið LUMI radio í Aalborg
Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 92,2 MHZ miðbýurin, FM 106,5 MHZ Aalborg suður, og FM 107,4 Aalborg norður, hvønn leygardag kl. 10.

Evangeliska Røddin
Odense. Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

Føroyska nærvarpið í Esbjerg
Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 93,5 MHZ hvønn leygardag kl. 11.00 og verður endursend kl. 16.00.

Føroysk møti
Føroysk møti eru triðja leygardag í hvørjum mánaði kl. 19 í hølunum hjá Bethania kirkjuni á Dag Hammerskjølds Gade 2. Drekkamuður er aftaná, øll eru hjartaliga vælkomin.

Føroyska arbeiðið Í Eliaskirkjuni
Møti er hvørt leygarkvøld kl. 19 í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 5 min. at ganga frá Hovedbanegården, 2 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 og 550S steðga nærhendis. Øll eru vælkomin. Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32 969995, ella Øssuri Kjølbro, tlf. 36 77 38 20.

Føroysku gudstænasturnar
í Samuelskirkjuni, Thorsgade 65, 2200 København NV, eru hvønn 1. og 3. sunnudag í mánaðinum kl. 14.00.
(Kirkjan er skamt frá Nørrebros Runddel). Presturin er at hitta á tlf. 38796146.

VALUTAKURSIR

		01.09.00	Ultimo august
USA	**Dollarar**	833,1100	833,1100
Bretland	**Pund**	1212,2100	1212,2100
Týskland	**Markur**	381,2300	381,2300
Svøríki	**Króna**	88,5200	88,5200
Noreg	**Króna**	92,3100	92,3100
Frakland	**Frankur**	113,6700	113,6700
Belgia	**Frankur**	18,4840	18,4840
Sveits	**Frankur**	481,3600	481,3600
Holland	**Gyllin**	338,3500	338,3500
Italia	**Líri**	0,3851	0,3851
Finnland	**Markur**	125,4100	125,4100
Ísland	**Króna**	10,3100	10,3100
Eysturríki	**Skillingur**	54,1870	54,1870
Spania	**Pesetas**	4,4810	4,4810
Portugal	**Escudos**	3,7190	3,7190
Kanada	**Dollari**	565,3000	565,3000
Grikkaland	**Drakmur**	2,2080	2,2080
Japan	**Yen**	7,8322	7,8322
Írland	**Pund**	946,7500	946,7500
	Evra	745,6300	745,6300

FØROYA SPARIKASSI

BBC WORLD

Leygardagur 2. september
0.00 **BBC News**
1.00 **BBC News**
1.30 **Click Online**
2.00 **BBC News**
2.30 **Science World**
3.00 **BBC News**
3.30 **Asia Today**
3.45 **World Business Report**
4.00 **BBC News**
4.30 **HARDtalk**
5.00 **BBC News**
5.30 **Talking Movies**
6.00 **BBC News**
6.30 **Simpson's World**
7.00 **BBC News**
7.30 **Click Online**
8.00 **BBC News**
8.30 **Correspondent**
9.00 **BBC News**
9.10 **Horizon: »An insight into PVS«**
10.00 **BBC News**
10.10 **Tobacco Wars**
11.00 **BBC News**
11.30 **Holiday**
12.00 **BBC News**
12.30 **This Week**
13.00 **BBC News**
13.10 **Horizon: »An insight into PVS«**
14.00 **BBC News**
14.30 **Click Online**
15.00 **BBC News**
15.10 **Under The Sun**
16.00 **BBC News**
16.10 **Tobacco Wars**
17.00 **BBC News**
17.30 **Talking Movies**
18.00 **BBC News**
18.30 **This Week**
19.00 **BBC News**
19.30 **Earth Report**
20.00 **BBC News**
20.10 **Horizon: »An insight into PVS«**
21.00 **BBC News**
21.30 **Talking Movies**
22.00 **BBC News**
22.10 **Under The Sun**
23.00 **BBC News**
23.30 **Simpson's World**

Sunnudagur 3. september
0.00 **BBC News**
0.30 **This Week**
1.00 **BBC News**
1.30 **Holiday**
2.00 **BBC News**
2.30 **Simpson's World**
3.00 **BBC News**
3.30 **Correspondent**
4.00 **BBC News**
4.30 **This Week**
5.00 **BBC News**
5.30 **The Air Show**
6.00 **BBC News**
6.30 **Reporters**
7.00 **BBC News**
7.30 **Life**

Vika 35 - 30. august

Vinnaratøl: **01 - 08 - 26 - 27 - 28 - 36**
Eykatøl: **30 - 38**

6 vinnaratøl: **3.472.468,- kr.**
5 vinnarat.+1 eykat.: **106.886,- kr.**
5 vinnaratøl: **3.939,- kr.**
4 vinnaratøl: **113,- kr.**
3 vinnaratøl: **26,- kr.**

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum